

# Plantur til matna

Sigga Rasmussen



# Stutt um útgávuna

Útgávan *Plantur til matna* er úrslit av eini verkætlan, ið Búnaðarstovan, í samstarvi við NÁM og Siggu Rasmussen, høvund, tók stig til á vári í 2022.

Umsókn um fígging av verkætlanini varð send Umhvørvis- og vinnumálaráðnum í 2022, og valdi táverandi landsstýrismaður í landbúnaðarmálum, Magnus Rasmussen, at játta verkætlanini fígging av kontuni fyri stuðul til menning á landbúnaðarøkinum.

Tað er tí ein gleði hjá verkætlanarbólkinum at kvitta fyri álitið við at leggja hesa sBókina um grønmetisdyrking í Føroyum fram nú.

Búnaðarstovan staðfesti longu í 2017 ein grundleggjandi tørv á frálærutilfari innan evnið grønmetisdyrking her á landi, men ta ferðina bar ikki á mál við ætlanini. Drúgt er tað, ið drýpur, verður tikið til, og soleiðis er eisini í hesum føri.

Hóast frálærutilfar um grønmetisdyrking er at finna í okkara grannalondum, er tørvurin tó stórur á frálærutilfari á føroyskum, og sum somuleiðis hevur kjølfesti í okkara egnu vakstrarlíkindum, bæði viðvíkjandi jørðildi og veðri, eins og umstøðum annars.

Frá Búnaðarstovunnar síðu eru vit stak væl nøgd við, at Sigga Rasmussen, cand. hort., vildi taka uppgávuna á seg sum rithøvundur til hendan bóklingin. Við sínum fakliga ástøði, sínum drúgvu royndum við gróðri í Føroyum, eins og hollu royndum frá undirvísing í plantufrøði m.a. á Fróðskaparsetrinum, fingust valla betri førleikar til at flyta hesa vitan inn í ein føroyskan samanhang.

Mong munnu tey eisini vera, sum í síni tíð høvdu gleði og gagn av greinum um líknandi evni, ið Sigga skrivaði í Búnaðarblaðnum, tey árini, hetta frálíka tíðarritið kom út.

Dr. scient. Rólvur Djurhuus, fyrrverandi landbúnaðarráðgevi, hevur verið so beinasamur at taka sær av rættlestrinum. Tøkk fái hann fyri at dugna verkætlanini við hesum.

Frá Búnaðarstovunnar síðu eru vit somuleiðis takksom fyri ta vælvild, ið NÁM hevur víst verkætlanini. Á NÁMI sóu tey tørvin á slíkum frálærutilfari og tóku beinanvegin undir við at veita verkætlanini neyðugu forlags- og útgevara tænasturnar viðvíkjandi ávikavist bæði tøkni, háttalagi og framleiðslu v.m.

Tøkk til NÁM við Eyðuni Gaard, Sigfríði Sólsker og Karinu Toftegaard, fyri gott samstarv.

Málbólkurin fyri hendan bóklingin eru miðnám og yrkisskeið v.m., eins og fólk flest við áhuga fyri evninum. Í fyrstu syftu er talan um eina sBók við

# Stutt um høvundin



**Sigga Rasmussen**
Cand.hort. frá Den Kongelige Veterinær og Landbohøjskole 1978

Námslektari í plantufrøði á Náttúru-vísindadeildini, Fróðskaparsetur Føroya

Limur í Skógfriðingarnevndini, og formaður frá 1995 – 2012

Formaður í Føroya Urtagarðsfelagi 1989 – 2009

Almenn skeið í plantufrøði, grønmeti, berjadyrking og urtagarðsrøkt á Fróðskaparsetrinum, Læraraskúlanum, Føroya fólkaháskúla, Búnaðarstovuni og kvøldskúlum á bygd.

Sendingar um gróður og urtagarðar í Útvarpi og Sjónvarpi Føroya

Greinar og smárit um plantur, vøkstur og dyrking í tíðarritum og bókum, og í ritstjórnini Føroysk Flora.

Ráðgeving og fyrilestrar um plantur, vistfrøði og dyrking

Orðabókagerð viðvíkjandi plantuheitum og plantufrøði

# Mairót

**Mairót,** hvítarót, *Brassica rapa* var. *rapifera*

en: turnip da: majroe is: næpa

Mairót er tveyára planta, hon mennist skjótt og myndar rót longu fyrsta árið, tá vit heysta hana.

Um hon sleppur at standa og ikki doyr av kulda, so blómar, fræar og doyr plantan annað árið.

Til eru mong navnasløg av mairót, bæði ymsar hvítar, gular og eisini bláreyð sløg. Tær kunnu eisini vera grønar ella reydligar í erva, og tær kunnu hava ymiskt skap.

Til eru eisini vársløg, sum búnast tíðliga, og heystsløg til seinni nýtslu, hesi goymast betri og kallast eisini heystrøtur.

Mairót mennist sera skjótt og kann heystast einar 8-10 vikur, eftir at hon er sádd. Tær smakka best smáar og nýupptiknar. Tí er skilagott, serliga til húsbrúk, at sáa eitt sindur í senn frá várinum og langt út á summarið. Tá kann rótamaðkurin neyvan týna øll røðini. Jú seinni verður sátt, tess minni fluga sigst.



*Mairót. Vanligastu mairøturnar, sum eru royndar her, er runda hvíta søta navnaslagið 'Snowball'*



*Mong navnasløg eru av mairót. Hvíta mairótin er FUKUKOMACHI F1. Gula mairótin er MÅLSELVNEPE. Hesar royndust væl í 2023*



Mairót – hetta er hin gula MÅLSELVNEPE



Mairøtur klárar at heysta



Søluklárar mairøtur úr Gásadali. Størru sløgini krevja betri pláss



Søluklárar mairøtur

# Knútakál

**Knútakál** (garðakál) *Brassica oleracea* var. *gongylodes*

en: kohlrabi da: knudekål, glaskål is: hnúðkál

Knútakál er gomul aliplanta aðrastaðni, og rættiliga nýggj hjá okkum. Plantan kann minna um mairót, men rundi kálleggurin við ásitandi bløðum grør omaná lendinum. Tað er hesin serstaki rundi kálleggurin, sum verður etin, best ungur.

Knútakál smakka væl rá sum smá, men eru eisini góð flust og tilgjørd sum størri. Til eru bæði hvít, ljósagrøn og bláreyð sløg og ymisk í stødd og búningartíð. Innan er knútakál hvítt og glaskent.



*Ymisk knútakál, eisini nevnd garðakál*





*Uttastovugarðurin. Ymiskt er hvussu tey ymsu navnasløgini trívast og hvussu væl tey tola kulda*





Sáa í røðum, tá lýkkan er komin, 1 cm djúpt og einar 20 cm ímillum planturnar í raðnum og 30-40 cm ímillum røðini, alt eftir navnaslagi. Sáa kanska fleiri ferðir, eisini tí at knútakál kann bert goymast eina stutta tíð. Tó tola summi navnasløg at standa úti um veturin. Verður annars velt sum aðrar røtur og dáma ikki súra mold. Um væta trýtur, so trænar planan.

**Ansa eftir frækeypi!**

Knútakál verður nevnt 'Kohlrabi' á enskum, og sonevnda 'Karlek' er eitt violett slag.

## Radisa

**Radisa,** *Raphanus sativus* var. *sativus*

en: radish, summer da: radis is: hreðka, sumarhreðka

Radisur kunnu grógva bæði skjótt og væl, og skjótvaksnar smakka best. Tað er mest tjúkki gróðrarleggurin vit eta. Tað finnast navnasløg, sum eru rund, avlong ella stórvaksin. Tær eru hvítar innan, uttan eru summar reyðar, reyðar og hvítar, gular ella bláreyðar og svartar. Eisini eru sløg at sáa tíðliga ella seint á sumri. Tær eru ein- ella tveyára plantur.

Radisur næla skjótt, fræið nælir við 4° C, sáa fræið 2 cm ímillum hvørt, 1-2 cm djúpt og einar 15 cm ímillum røðini. Klárt er at heysta einar 4-5 vikur seinni.

Pappírsútgávan byggir á sBókina, sum er ein sjálvstøðug talgild útgáva, sum sameinir bók og internet, og til ber at skriva egnar viðmerkingar.

**QR-kota „Plantur til matna“**

# Plantur til matna

© Nám og Búnaðarstovan 2026
Høvundur: Sigga Rasmussen
Myndir: Sigga Rasmussen
Umbróting: Grafia
Prentumsiting: Estra
1. útgáva, 1. upplag: 2026

ISBN: 978-99972-2-700-3